HOYVÍKAR SKÚLI

# Ársfrágreiðing 2016

Matarskipan hjá PM PLUSS er sett í verk í Hoyvíkar skúla.

Felags foreldrafundur hevur verið í samband við evnið talgildi skúlin – ein gongd leið. Gitte Klein og André Danielsen løgdu fram hvør sína áskoðan á evnið "Tann talgildi skúlin".

Nýggi skúlabygnaðurin hevur verið lagdur fram og viðgjørdur í sambandi við, at nýggjur skúlastjóri tók við starvinum 17. mars 2016

Hoyvíkar skúli hevur fingið nýtt innbúgv til felagshølini í Pyramiduhøllini og við høvuðsinngongdina. Hetta hevur verið til stóra gleði fyri næmingarnar, tí hesi hølini hava mestsum staðið tóm í fleiri ár.

Skelti er komin í skúlagarðinum. Tað er ikki loyvt at parkera í skúlagarðinum í tíðarskeiðnum frá kl. 08:00 – 15:00. Skelti er eisini komin á portrið niðri við Vegin langa, har heitt verður á øll um at hava portrið afturlatið.Harafturat eru skelti komin á Hoyvíkar skúla, ið ger skúlan meiri sjónligan í nærumhvørvinum og sum kunnar fólk um inngongdirnar í skúlanum.

Foreldraumboðini í skúlastýrinum saman við leiðsluni og skrivara í skúlanum tóku stig til at býta endurskin út til næmingarnar í skúlanum. Hetta var eitt átak, ið skuldi gera vart við týdningin av at øll nýta endurskin.

Hoyvíkar skúli fekk játtað 200.000 til útgerð til skúlagarðin. Avgerð varð tikin um at keypa eina klatripyramidu, ið eftir ætlan verður sett upp um miðjan apríl 2017.

Trivnaðarkanning er gjøgnumførd millum starvsfólkini í Hoyvíkar skúla. Kanningin verður uppgjørd og løgd fram fyri lærarum og komandi skúlastýri fyrst í 2017.

Nýtt skúlastýri er valt í Hoyvíkar skúla. Inn komu Petur Mittún, Malan Mikkelsen og Jeanette Blaasvær. Tiltakslimur er Una Matras.
Nýggja skúlastýrið tekur við 1. januar 2017.